# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Tað er syrgiligur lesnaður, at alment lønt skulu tora at peika eftir okkara sjófólki og arbeiðandi fólki. Harmuligt at hesir menn skulu misunna t. d. at ein minstaløn er, og at flakafólk verða tryggjað so frægt*

GERHARD LOGNBERG, LØGTINGSMAÐUR

## Altavgerandi við neyvari kanning

Hesa seinatu vikuna hevur Atlantic Airways verið fyri tveimum sera óhepnum hendingum í sambandi við flúgving til Føroya. Leygardagin varnaðist flogskiparin brek í bremsuskipanini, beint áðrenn flogfarið skuldi lenda í Vágum. Hann fylgdi øllum trygdarprosedurum og lent varð ístaðin á norskum flogvølli. Flogvøllurin í Vágum er ov stuttur, tá samlaða bremsiskipanin ikki er optimal, og tí verður longri flogvøllur í eitt nú Noregi brúktur til slíka trygdarlending.

Nú øll vóru so fegin um, at henda trygdarlendingin gekk so væl í hond, varð eisini mett, at hetta helst var eitt tekniskt brek, sum eingin kann verja seg fyri. Men so hendi tað aftur bert nakrar fáar dagar seinni. Sama bremisskipan í sama flogfarinum á júst sama stað endurtók seg. Men aftur gekk alt væl í sambandi við trygdarlendingina, sum eisini fór fram á sama stað í Noregi.

So far so good. Alt gekk fyrimyndarliga fyri seg, eingin fekk skaða, tó at mong helst hava fingið hvøkk ella skelk av hesum hendingum. So er spurningurin: hvussu við framtíðini! Er talan um júst sama brek og um so er, hvussu kann tað íkoma tvær ferðir innan fyri so stutt tíðarbil? Ella er talan um onnur brek í somu bremsiskipan, sum kunnu íkoma uttan at hetta hevur nakað við dagliga eftirlitið at gera? Er talan um menniskjanslig mistøk og at eftirlitsarbeiðið ikki er gjørt nóg væl? Hesum spurningum hava vit ongan møguleika at svara, og tí eiga vit eisini at vera sera varin við at fella dómar. Leiðslan í Atlantic Airways hevur gjørt rætt í at taka flogfarið úr flúgving fyri at fáa tað kannað til fulnar.

Vit ganga út frá, at kanningin fer at siga okkum, um talan hevur verið um menniskjanslig mistøk – um at eftirlitsarbeiðið ikki hevur verið nóg gott. Og kemur kanning til slíka niðurstøðu, tá má ovasta leiðslan meta um, hvørjar avleiðingar hetta skal fáa. Vit, eiheldur nakar annar, hava hvørki rætt ella møguleika fyri at leggja nakra skuld á tey fólkini, sum hava tekniska eftirlitið hjá Atlantsflog um hendi. Ein neyv kanning má til, áðrenn nøkur ábyrgd kann plaserast.

Tað er tó greitt, at tað hevur stóran týdning fyri álitið á Atlantic Airways og tess trúvirði, at kanningarnar verða gjørdar so væl og neyvt sum til ber. Her má einki koyrast undir teppið, tí her er jú talan um okkara tjóðarflogfelag, sum hevur eina stóra ábyrgd mótvegis øllum teimum ferðandi, ikki minst nú tað flytur flestu ferðafólkini millum Føroyar og umheimin.

**Sosialurin**

# Farið heldur og gerið okkurt til nyttu!

**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður



**– Skam fáið tykkum í hasum strategibólkinum. Farið heldur og gerið okkurt til nyttu, heldur enn miðvíst at royna at niðurbróta teir og tey, sum halda okkara landi uppi, sigur Gerhard Lognberg m. a. í viðmerking**

Ja, nú er aftur ein strategibólkur av flippumonnum komin við eini visjónsætlan.

Nú er kosturin til sjófólk og onnur í arbeiðararørsluni ikki serliga vinarligur.

Burtur við øllum sum stuðlar verkafólk í fiskivinnuni.

Meðan teir sjálvir - flippumenninir, hava allar sømdir við eftirløn og øllum sum hartil hoyrir. Helst frían bil, sum onkur annar eigur, sjálvsagt alment.

Nei, eg vil so staðiliga appilera til Fiskimannafelagið og Føroya Arbeiðarafelag: Tit hava gjørt vart við tykkum. Sjálvur ætli eg so avgjørt at stuðla tykkum, tað ið eg eri mentur.

Eg haldi tað verða syrgiligur lesnaður, at alment lønt skulu tora at peika eftir okkara sjófólki og arbeiðandi fólki. Harmuligt at hesir menn skulu misunna t. d. at ein minstaløn er, og at flakafólk verða tryggjað so frægt. Skulu sjómenn sita við ongum, tá ein túrur mislukkast?

Fólk sum tit, eru ikki verd at loysa tveingirnar hjá. Nei Jan Mortensen, tað eru ikki hasi fólkini, sum hava sogið mergin úr okkara landi. Nei, tað eru heldur tit sjálvir, sum halda skeið fyri hvørjum øðrum. Ella fundast innanhýsist, soleiðis at lítið og einki av fólki hjá tí almenna eru at hitta.

Ringir tú til tað almenna, tey flestu, ja so hoyrir tú ein sangtóna, og síðani verður tú umstillaður eini fimm ferðir, síðani er tann ikki at hitta, sum tú skuldi tosa við.

Verður hetta standurin, sum flippumennirnir koma fram til í visjón 2015, so ynski eg hana har ið piparið grør.

Sjálvur komi eg úr einum arbeiðaraheimi. Foreldur og átta systkin, og pápin var sjómaður.

Nei, tú vaks ikki upp av mjólk og hunangi, men eg veit, hvussu smátt og ótrygt tað var, tá pápin hevði hjallin á sjónum, ella stóð og flakti í fiskakjallaranum.

Nei eg siti í samgongu sjálvur, og vil eg minna flokkin sum eg eri valdur fyri, at minnast sínar røtur, og tað stavnhald flokkurin var valdur til.

Fyri ikki at gloyma røturnar, ger tað einki at vit lesa bókina, sum Jóannes Dalsgaard skrivaði um Fylking á Tvøroyri. Fylking var stovnað 1915, og er elsta abeiðsmannafelag í Føroyum.

At man kann verða so frekur, at tú beinleiðis biður henda part av fólkinum fara í onnur lond at vinna fyri lívsins uppihald fyri at kunna sleppa at innflyta bíliga arbeiðsmegi.

Jóhan á Mýruni skuldi einaferð siga, tá flippu......? sluppu at stýra okkara landið, tá var undirgangur nær. Eg vil ikki siga orði hann segði, men eg skal fínka um tað og siga flippumenninir.

Ein áheitan á Javnaðarflokkin og samgonguna. Latið okkum feia alt hatta óndsinnaða møsnið ímóti tí arbeiðandi fólkinum av vegnum, uttan so frægt at skeita til hesu hatursgleps frá teimum ríku.

Og eiga vit at standa saman við arbeiðararørsluni í okkara landið sum ein, og takka fakfeløgunum fyri, at enn er styril í teimum. Mín partur skal ikki liggja eftir, at lyfta við, ímóti teimum vælbjargaðu, sum bara kunnu kvitta fyri mánaðarlønina, hon kemur bara.

Til endans – skam fáið tykkum í hasum strategibólkinum. Farið heldur og gerið okkurt til nyttu, heldur enn miðvíst at royna at niðurbróta teir og tey, sum halda okkara landi uppi.

Við Javnaðarkvøðu.

# Eg royni at tálma rúsdrekkapolitikkinum!

**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður

Hoyrdi ein dagin Bill Justinussen í tíðindasendingini hjá útvarpinum, tað í sær sjálvum er ikki so løgið, tí har er Bill oftani at hoyra.

Tað sum eg festi meg við var, at Bill vildi siga fyri Føroya fólki, at teir sum sita í samgongu, gjørdu einki fyri at tálma rúsdrekkapolitikkinum, men bara rópa eitt sindur, tá uppskoti var viðgjørt.

Góði Bill, hetta er beinleiðis ósatt, sum tú sigur ella lygn. Tú veit fullvæl, at eg sjálvur og fleiri við mær hava nettup tálmað hesum politikki, og fari eg eisini framhaldandi at hava mína greiðu støðu um rúsdrekka.

Nei Bill Justinussen, tú kann gott fara í miðlarnar at ákæra onnur fyri einki at gera, meðan tú sjálvur stendur um miðu og verjir land og fólk.

Tú minnist kanska ikki, tá eg hevði brúk fyri tínum stuðuli. Hvat gjørdi tú tá. Jú, tú fór í part við teimum, sum helst vildu hava meg burtur av flísagrótinum í løgtinginum.

Nei Bill, ikki fara út at fortelja Føroya fólki, at eg royni at verja rúsdrekka, um so var kundi eg sagt tað sjálvur.

Ein lítil viðmerking til Una Danielsen, form. hjá hotellunum. Ja, tú helt at tað var skeivt, at vit ikki kundu sita úti og nýta salat og eitt glas av víni. Ja, eg hoyri teg. Fyri mær er tað so avgjørt tann minsti skaðin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.